Steffan Klein Poulsen
Jenis av Rana

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt
(Javnseting av øðrum ansingarloysnum við kommunalu ansingarstovnarnar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2005, løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006 og løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg**
um
dagstovnar, dagrøkt og aðra barnaansing"

2. Í § 1 verður aftan á "fevnir um" sett: "ymisk sløg av barnaansing, har ímillum heimaansing, og um".

3. Í § 2, stk. 1 verður "á dagstovninum og dagrøktini" broytt til: "í barnaansingartilboðum".

4. Aftan á § 3 verður sett:
"**§ 3 a.** Kommunan kann geva tilboð um ískoyti til aðra ansing av børnum undir skúlaaldur, har ímillum heimaansing. Heimaansing er í hesi lóg at skilja sum, at barnið verður ansað av foreldrum ella øðrum nærstandandi.
Stk. 2. Ískoytið sambært stk. 1 kann í mesta lagi vera 70% av rakstrarkostnaðinum fyri stovnspláss, sum barnið annars hevur í boði frá kommununi.
Stk. 3. Verður ískoytið latið til heimaansing, verður tað útgoldið sum A-inntøka til tann, sum ansar barninum, og verður tá eftirløn á 15% latin afturat ískoytinum.
Stk. 4. Til ber at vera tvey um at heimaansa einum barni. Tá verður ískoytið býtt ímillum ansingarpersónarnar, í samsvari við hvussu ansingarábyrgdin er býtt. Um tvey eru um at heimaansa einum barni, er krav, at annar persónurin er foreldur at barninum.
Stk. 5. Verður ískoytið latið til annað enn heimaansing, t.d. privata dagrøkt, verður tað útgoldið beinleiðis frá kommununi til privata ansingartilboðið.
Stk. 6. Metir kommunan, at ansingin av einum barni, sum kommunan letur ískoyti til, ikki livir upp til endamálið við lógini, hevur kommunan rætt til at steðga útgjaldinum til eina og hvørja tíð."

5. Í § 4, stk. 1, 1. pkt. verður aftan á "dagrøktarapláss" sett: "og um ískoyti til aðrar ansingarloysnir".

6. § 4, stk. 1, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Kommunan kann tó loyva barni pláss ella geva tilboð um ískoyti til ansing, hóast barnið ikki er skrásett í kommununi."

"Børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð sambært §§ 3 og 3 a á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi."

§ 2

7. § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1 Orsakir til uppskotið

Barnaansingarøkið er í dag skipað soleiðis, at kommunurnar rinda meginpartin av kostnaðinum fyri at hava eitt barn á kommunalum dagstovni ella dagrøkt. Hetta hevur við sær, at tað fyri foreldur fíggjarliga er nógv skynsamast at koyra børnini í eitt av kommunalu ansingartilboðunum, tá barsilsfarloyvi teirra er liðugt. Nógv tey flestu føroysku børnini eru sostatt í einum kommunalum ansingarstovni frá eitt til umleið seks ára aldur. Sum heild eru nógvar familjur væl nøgdar við hesi tilboð og hava gleði av at kunna hava síni børn lutfalsliga bíliga í ansing í dagtímunum.

Tað finnast tó eisini fleiri føroyskar familjur, sum av ymsum orsakum høvdu ynskt sær eina aðra ansingarloysn. Til dømis kann nevnast, at summi (t.d. sjófólk, og tey, sum arbeiða í vaktum) hava arbeiðstíðir, sum ikki passa væl til upplatingartíðirnar á kommunalu ansingartilboðunum.

Summi foreldur ynskja eisini, ella meta sítt barn hava tørv á, at barnið verður ansað heima longri enn tað fyrsta árið. Harafturat hevur tað til tíðir verið avbjóðandi at finna nóg mikið av støðugum, skikkaðum starvsfólkum til summar dagstovnar, við m.a. skerdum upplatingartíðum sum avleiðing.

Tað er tó fíggjarliga sera trupult hjá foreldrum at velja eina aðra ansingarloysn, av tí at so nógvur peningaligur stuðul verður veittur til kostnaðin av kommunalu dagstovnaplássunum, og eingin stuðul til aðrar loysnir. Kostnaðarstøðið í samfelagnum er eisini so mikið høgt, at flestu familjur ikki klára seg fíggjarliga við einari inntøku.

Hetta hevur tvær fylgjur við sær: at summi gera brúk av kommunalum dagstovnatilboðum, hóast tey høvdu ynskt eina aðra loysn; og at onnur velja eina aðra loysn, hóast tað ber illa til, við stórum fíggjarligum avleiðingum fyri familjuna.

Er annað foreldrið heima við børnunum uttan lønt arbeiði, samlar viðkomandi ikki upp til eftirløn, og hevur ikki rætt til barsilspening, um hann fær eitt barn afturat.

1.2 Galdandi lóggáva

Galdandi lóg heimilar kommunum at geva børnum, búsitandi í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni ella í dagrøkt, og ásetir nærri reglur fyri virkseminum á slíkum stovnum. Lóggávan

ásetir, at húsaútreiðslur verða rindaðar av kommununi, og rakstrarútreiðslur verða deildar ímillum kommunu og avvarðandi hjá barninum, tó so, at avvarðandi í mesta lagi kunnu rinda 30% av rakstrarkostnaðinum.

Nógvar kommunur royna at halda foreldragjaldið so lágt sum til ber, umframt at geva systkinaavsláttur. So foreldur rinda hægst sannlíkt í flestu førum minni enn lógarásetta evstamarkið.

Lógin ásetur, at kommunurnar hava eftirlitsskyldu við dagstovnunum í sínum øki, og at landsstýrisfólkið hevur eftirlit við, at kommunurnar røkja sína skyldu hesum viðvíkjandi.

1.3 Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at geva familjum størri frælsi at skipa sín gerandisdag, sum teimum tykir best, og at javnseta heimaansing og privat ansingartilboð við kommunalu dagstovnarnar.

Harumframt er endamálið í verki at vísa størri virðing fyri stóra týdninginum, sum barnauppaling hevur fyri samfelagið, og sum nærsambond og tryggleiki hevur fyri børnini.

Søguliga hava tær uppgávur, sum kvinnur í høvuðsheitum tóku sær av, í stóran mun verið óløntar, og í ein vissan mun lítið virdar í mun til løntar uppgávur. Síðani eru nógv lønt størv innan umsorganararbeiði komin, og arbeitt hevur verið við at betra um lønarviðurskiftini og virðingina fyri hesum økinum. Barsilsfarloyvi við løn er longt til eitt heilt ár, og hámarkið hækkað eitt sindur - harvið viðurkenna vit eisini stóra týdningin av nærsambondum fyri menning og trivna hjá børnum.

Framvegis tørvar okkum at viðurkenna betur ómetaliga stóra leiklutin hjá foreldrum í at mynda og vara um næsta ættarliðið, eisini aftaná at barnið hevur fylt eitt ár. Foreldur hava barnsins besta fyri eygað og kenna ofta tørvin hjá sínum barni betur enn nakar annar; tí eiga vit sum meginregla at hava álit á teirra meting av, hvør ansingarloysn er best fyri tey.

Endamálið við uppskotinum er eisini at lætta um gerandisdagin hjá teimum foreldrum, sum í løtuni eru fíggjarliga sperd, orsaka av, at tey hava valt at ansa sínum børnum heima.

1.4 Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið víðkar núverandi heimildirnar hjá kommununum á barnaansingarøkinum til eisini at fevna um ískoyti til heimaansing og pláss á privatum dagstovni. Velja kommunurnar at gera brúk av hesi heimildini, fer tað at betra um møguleikarnar hjá barnafamiljum at velja tær loysnir, sum passa teimum best.

Í mun til onnur uppskot, sum eru løgd fram við tí fyri eygað, at geva foreldrum ískoyti til heimaansing, gevur hetta uppskotið í nógv størri mun foreldrum møguleika at skipa seg soleiðis, sum tey meta best, m.a. við at býta ansingina av børnunum ímillum sín.

Harumframt er ískoytið í hesum uppskotinum eftirlønargevandi, og inngongur í útrokningargrundarlagið fyri barsilspening. Tískil er nógv minni vandi fyri, at hetta uppskotið kemur at vera viðvirkandi til at skapa størri ójavnar í samfelagnum. Uppskotið væntast heldur at vera útjavnandi, við tað at ískoytið kann koma at lætta væl um hjá summum fíggjarliga sperdum familjum.

Uppskotið hevur eisini við sær, at ískoyti til privatar dagstovnar ella privata dagrøkt verður útgoldið beinleiðis frá kommununi til stovnin. Hetta vil tryggja, at onnur, t.d. privatir ansingarstovnar, hava eitt fíggjarligt grundarlag fyri sínum virksemi.

1.5 Avleiðingar av uppskotinum
Uppskotið hevur ongar beinleiðis avleiðingar, uttan so, at kommunurnar velja at gera brúk av nýggju heimildini, sum tær fáa tillutað við hesi lóg. Velja kommunurnar at bjóða sínum borgarum ískoytið, sum lógin heimilar, kemur tað at krevja eitt sindur av umsitingarligari orku frá kommununi.

Sjálvt ískoytið er avmarkað til ikki at vera størri enn tað, sum kommunan annars hevði brúkt uppá barnið, um tað var í kommunalum ansingartilboði. Harumframt kunnu kommunurnar væntast at fáa part av ískoytinum aftur í skattainntøkum, og tí standast allarhelst ikki stórar fíggjarligar avleiðingar av hesum fyri kommunurnar.

Fyri føroyskar familjur hevur uppskotið hinvegin fleiri jaligar avleiðingar, um kommunurnar velja at gera brúk av sínum nýggju heimildum. Verður ískoytið íverksett av kommununum, kann tað føra til, at familjur hava størri frælsi at skipa gerandisdagin, og at summar familjur, sum eru sperdar í dag, gerast betur fyri fíggjarliga. Harvið kann uppskotið vera við til at fremja trivnaðin hjá føroyskum børnum og teirra familjum.

1.6 Ummæli
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í aðrari lóggávu og øðrum reglum, ið kunnu verða viðkomandi í sambandi við tær broytingar, ið verða gjørdar í hesum lógaruppskoti.

Kapittul 2. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Til nr. 1
Heitið á løgtingslógini verður broytt, soleiðis at hetta samsvarar við nýggja innihaldið í lógini. Við broytingunum í hesum uppskotinum vil lógin eisini fevna um onnur sløg av barnaansing enn dagstovnar og dagrøkt.

Til nr. 2 og 3
Við hesum broytingunum verða eisini onnur sløg av barnaansing fevnd av lógini og javnsett við barnaansing á dagstovni og í dagrøkt.

Til nr. 4
Til § 3 a, stk. 1
Ætlanin við hesum stykkinum er at geva kommununum heimild til at lata ískoyti til aðra barnaansing enn kommunalu ansingarstovnarnar, har ímillum heimaansing av børnum. Pengarnir skulu fylgja barninum, og tí er ikki ásett nærri, hvør móttakarin av ískoytinum er.

Til § 3 a, stk. 2
Hetta stykkið ásetir eitt hámark fyri ískoytið. Endamálið við hesi ásetingini er, at ískoytið ikki skal fara uppum upphæddina, sum kommunur longu brúka uppá dagstovnapláss, og tí skal vera lutfalsliga útreiðsluneutralt fyri kommunurnar.

Til § 3 a, stk. 3
Hetta stykkið ásetur, hvussu ískoytið verður útgoldið, um eitt barn verður ansað heima.

Orsøkin til, at skotið verður upp at gjalda ískoyti fyri heimaansing út sum A-inntøku, er serliga fyri at tryggja teimum, sum ansa børnum heima, rætt til barsilspening og eftirløn á jøvnum føti við onnur.

Orsøkin til, at valt er ikki at avmarka ískoytið til einans at kunna gjaldast foreldrunum, er fyri at geva familjum størri frælsi at skipa seg, og fyri at rúma tí veruleika, at ikki øll børn hava bæði foreldrini sum høvuðsumsorganarpersónar. Krav er tó, at tað skulu vera 'nærstandandi' hjá barninum - hetta skal skiljast sum, at talan er um fólk, sum búgva í heiminum hjá barninum, ella eru nærskyld við og vælkend av barninum. Tankin við hesum er, at munur skal gerast á privatum ansingartilboðum og heimaansing.

Tryggjað er í hesum stykkinum eisini, at tey, sum ansa sínum børnum heima, hava møguleika at spara saman eftirløn.

Í sambandi við barsilsfarloyvi, inngongur ískoytið í útrokningargrundarlagið sum onnur lønarinntøka, tvs. at løntakarin hevur rætt til útgjald frá barsilsgrunninum fyri arbeiðið, sum viðkomandi er í farloyvi frá. Hetta merkir so, at eitt foreldur ikki hevur rætt til ískoytið samstundis sum, at viðkomandi móttekur barsilspening, har ískoytið inngongur í útrokningargrundarlagið.

Serligt viðvíkjandi teimum, ið fáa fyritíðarpensjón, skal nevnast, at ein ikki kann hava størri part av ansingarábyrgdini av einum barni, og harvið av ískoytinum, enn ein er mettur at hava arbeiðsførleika. Er arbeiðsførleikin t.d. skerdur við 60% kann ein í mesta lagi hava 40% av ansingarábyrgdini og harvið útgjaldinum.

Tað er tilskilað í lógini, at ískoytið skal rindast út til tann, sum í veruleikanum ansa barninum. Hetta er fyri at tryggja, at ískoytið fremur endamálið við lógini.

Til § 3 a, stk. 4
Ásett er, at møguligt er at býta ískoytið ímillum fleiri fólk, um fleiri av teimum nærmastu hjá barninum deilast um ansingina. Hetta er tikið við, fyri betur at avspegla tann veruleika, at tað í dag er vanligt, at bæði foreldrini taka lut í barnauppalingini og skiftast um at ansa børnunum.

Tað er tilskilað í lógini, at um tvey eru um at heimaansa einum barni, og deilast um ískoytið, skal hetta býtið vera í samsvari við ansingarbýtið. Hetta er fyri at tryggja, at ískoytið fremur endamálið við lógini.

Harafturat er tað ásett, at um tvey eru um at heimaansa, skal annar vera foreldur at barninum. Hetta er fyri at tryggja barninum ikki at hava skiftandi ella ov nógvar umsorganarpersónar. Leggjast kann afturat í hesum samanhanginum, at tað sum meginregla í minst møguligan mun eigur at verða gjørd broyting í, hvør móttekur ískoytið og harvið ansar barninum.

Til § 3 a, stk. 5
Ætlanin við hesum stykkinum er at javnseta privatar ansingarstovnar við teir kommunalu. Ískoytið inngongur í hesum førinum í raksturin á tilboðnum saman við foreldragjaldinum á sama hátt sum í einum kommunalum dagstovni.

Til § 3 a, stk. 6
Endamálið við hesi ásetingini er at tryggja, at ískoytið verður latið til barnsins besta. Privat ansingartilboð og tey, sum ansa børnum heima, skulu tí, á sama hátt sum almennir dagstovnar, liva upp til endamálið við lógini. Lagt verður her upp til, at kommunan hevur eina ávísa eftirlitsskyldu við teimum, sum móttaka ískoyti til ansing. Í hesum sambandinum er rímiligt, at kommunan kann hava samrøður við, biðja um frágreiðingar frá ella gera vitjanir hjá teimum, sum heimaansa. Fyri privat ansingartilboð annars, er eftirlitsskyldan hin sama sum fyri kommunalar stovnar.

Til nr. 5
Talan er um fylgibroyting, ið ásetir, hvar umsókn um ískoyti til barnaansing skal latast inn.

Til nr. 6
Talan er um fylgibroyting. Ætlanin við hesi ásetingini er at tryggja, at kommunan, eins og hon kann við plássi á dagstovni ella dagrøkt, eisini kann geva tilboð um ískoyti til barnaansing, hóast barnið ikki er skrásett í kommununi.

Til nr. 7
Við broytingini verður tryggjað, at børn við serligum tørvi verða javnsett við onnur børn tá tað kemur til tilboð um pláss á dagstovni ella dagrøkt og tilboð um ískoyti til aðrar ansingarloysnir.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, xx

Steffan Klein Poulsen

Jenis av Rana